Bárður á Lakjuni
Beinir Johannesen
Grímur Sundstein
Elsebeth Mercedis Gunnleygsdóttur
Jacob Vestergaard
Jørgen Niclasen
vegna Fólkaflokkin

Løgtingið

Uppskot til

Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um sjófeingi (Sjófeingislógin)
(Leingja gildistíðina á rættindum)

§ 1

Í løgtingslóg nr. 152 frá 23. desember 2019 um sjófeingi (Sjófeingislógin), sum broytt við løgtingslóg nr. 59 frá 13. mai 2020, § 78 í løgtingslóg nr. 91 frá 7. juni 2020, løgtingslóg nr. 106 frá 29. juni 2020, løgtingslóg nr. 185 frá 18. desember 2020, løgtingslóg nr. 186 frá 18. desember 2020, løgtingslóg nr. 70 frá 5. mai 2021, løgtingslóg nr. 71 frá 5. mai 2021, løgtingslóg nr. 170 frá 21. desember 2021 og løgtingslóg nr. 89 frá 16. mai 2022, verður í § 7, stk. 1 og 2 "1. januar 2034" broytt til: "1. januar 2036".

§ 2

Henda løgtingslóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

Almennar viðmerkingar

Hetta uppskot hevur til endamáls at leingja gildistíðina á veiðiloyvum og fiskiloyvum í bólki 5 til 1. januar 2036.

Tað er neyðugt, at fiskivinnan hevur støðugar og greiðar karmar at virka undir. Gildistíð á veiðiloyvum er ein sera grundleggjandi partur av kørmunum, og hvussu vinnan leggur virksemið tilrættis.

Verandi landsstýri hevur ikki valt at leingja veiðiloyvini síðan tey tóku við. Sagt verður, at arbeitt verður við einari aðrari loysn, og verður støða ikki tikin til veiðiloyvini fyrr enn tá.

Í 2007 blivu loyvini uppsøgd, og varð ein nýggj skipan samtykt, beint áðrenn loyvini gingu út. Tað skapti ikki støðugar karmar, men støðugan ótryggleika í vinnuni. Uppskotssetararnir ynskja ikki, at vinnan aftur fer at uppliva tann ótryggleika, ið fiskivinnan livdi undir frá 2007 og frameftir.

So leingi ongin onnur loysn við veiðiloyvum finst, eigur gildistíðin á teimum at verða longd, so vinnan veit, hvat hon hevur at arbeiða við og fær lagt sítt virksemi til rættis.

Serligar viðmerkingar

Til § 1
Gildistíðin á veiðiloyvum og fiskiloyvum í bólki 5 verður longd til 1. januar 2036. Veiðirættindi hava somu gildistíð sum veiðiloyvi.

Til § 2
Áseting av gildiskomu.

Á Løgtingi, 4 oktober 2023

Bárður á Lakjuni | Beinir Johannesen | Grímur Sundstein

Elsebeth Mercedis Gunnleygsdóttur | Jacob Vestergaard | Jørgen Niclasen